HOYVÍKAR SKÚLI

Skúlastýrisfundur

Hósdagur, 07. september 2023 kl. 16.30 – 18.00

Á fundinum vóru: Rannvá Mortansdóttir, Jógvan Páll Fjallsbak, Laila Í. Hentze, Kristianna W. Poulsen, Leivur Simonsen, Gunnvør Balle, Jens á Skipagøtu og Malan á Dul Nielsen

Fundarleiðari: Rannvá Mortansdóttir

Skrivari: Malan á Dul Nielsen

Skrá:

1. **Leiðslan kunnar:**

Kunnað verður um broytingar í skúlanum:

Okkara 1. og 2. flokkur hava í fleiri ár verið skipaðir, sum stórir flokkar við upp til 48 næmingum. Avgerð er tikin um, at teir skulu skipast sum vanligir flokkar eins og aðrir flokkar í Hoyvíkar skúla. Tað tykist sum, at næmingar og lærarar eru glaðir fyri hesa loysnina.

Interaktivar talvur eru nú settar upp alla staðni. Hetta er innan fyri núverandi fíggjarkarmar, hóast kommunan hevur lovað at koma við einari eykajáttan. Hetta kann koma at ávirka fíggjarviðurskiftini hjá skúlanum tann skeiva vegin.

Hoyvíkshøllin er ólæst í skúlatíð. Garðvakt er sett í hallirnar.

Fyrsti námsfrøðiligur fundur hevur verið

Felags foreldrafundirnir hava verið

Spælibólkarnir eru farnir í gongd frá 1. – 4. flokk.

Telefonpolitikkurin er tillagaður soleiðis, at allar telefonirnar vera latnar læraranum um morgunin og læstar inn í einum skápi, til skúladagurin er av.

1. **Taka samanum frá í fjør:**

Evnið um skúlagarðin verður tikið upp aftur, tá ið nýggjur stjóri er settur, og sum heild er skúlastýrið nøgd við farna skúlaár.

2. Trivnaður – innkomið mál

Hevur skúlin eina trivnaðarætlan fyri at fyribyrgja happing?

Tað hevur skúlin, men tað stendur ikki nógv á heimasíðuni, men har verður víst til eitt skriv, sum lærararnir hava atgongd til á einari starvsfólkamappu. Trivnaðarætlanin burdi verið løgd út á heimasíðuna, gjørd meiri sjónlig, og hon burdi verið løgd fram og viðgjørd og eftirhugd til ein námsfrøðiligan fund.

3. Mannagongdir í sambandi við starvsfólkaklagur

Starvsfólkaklagu er mál fyri skúlaleiðsluna. Avsendarin fær at vita, at klagan er móttkin, men fær ikki meir at vita.

4. Tiltøk í heyst

At fáa einglaveingirnar og býta endurskin út til næmingarnar um morgunin. Tað skal gerast í viku 43.

5. Komandi fundir

Fyrsta hósdag í hvørjum mánað. Somu tíð sum í fjør

6. Ymiskt

Í sambandi við jólahaldið, so er staðfest, at kirkjan er ov lítil. Hugskot hava verið uppi um at brúka høllina ella Lívdina ístaðin. Hetta verður tikið upp aftur á næsta skúlastýrisfundi.

Eisini er eitt ynski frá skúlastýrinum í SVL, at bæði skúlastýrini skipa fyri einum felagstiltaki/fyrilestri.